# Matskeið í Marknagili

**Skeiðsdepilin við Marknagil fer saman við danska Hotel- og Restaurantskolen at skipa fyri skeiði í »Buffet« á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í næstu viku**

MATSKEIÐ



Týsdagin og mikudagin í næstu viku verður skeið í Buffet á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn.

Skeiðsdepilin við Marknagil skipar saman við danska matstovu- og hotelskúlanum fyri skeiði um matgrð á fati, og tveir danskir lærarar fara at undirvísa.

Talan verður um nýggj hugskot við spennandi rættum, sigur Skeiðsdepilin við Marknagil í tíðindaskrivi.

Tær báðar, Laila Hyllekvist og Ingrid Petersen, fara at siga frá um hvussu til ber at borðreiða við ymsum rættum á fati til eitt nú jolaborðhald, morgunmataborð og »grønum rættum«, har fitiinnihaldið í mesta lagi skal røkka teimum 30 prosentunum.

Tað verður undirvíst í bæði teori og praktik – køkspraktik – kalla tey tað. Hetta skal geva luttakarunum møguleika fryi at seta saman eitt meira fjølbroytt og spennandi matkort, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Tað fer eisini at bera til hjá fólki, sum annars ikki luttekur á skeiðnum, at koma framvið og síggja – og ikki minst smakka – tað, sum gjørt verður á skeiðnum.

Mikudagin tann 9. oktober verður høvi hjá almenninginum at støkka inn á gólvið og keypa sær ein rætt av tí, tey gera, fyri vanligan døgurðaprís hjá Skúlaheiminum, stendur í tíðindaskrivinum frá Skeiðsdeplinum.

Matarhøllin á Skúlaheiminum er opin sum vanligt frá klokkan 11.30 til 12.30.

**ej**

## 50 ára føðingardagshald á Argjum

Leygardagin fyllir Argja skúli 50 ár. Í hesum sambandi verður gamli skúli opin leygardagin frá klokkan 10 – 14.

Høvi verður at síggja gamla skúla, gamlar skúlamyndir og myndir av skúlaflokkum. Ein drekkamuður verður eisini at fáa. Argja skúli bjóðar øllum vælkomin inn á gólvið

## Kjølar byrja um tríggjar vikur

**Fyrsta framførslan við nýggju Kjølum verður í Badmintonhøllini í Havn síðst í oktober mánaði**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Kjølar fer at spæla til fleiri tiltøk fram til jóla. Teir hava boðað frá, at teir eru farnir at venja saman, og 26. oktober verður fyrst framførslan hjá teimum.

Tá fara Signar í Homrum, Henning Nicodemussen, Jens Tummas Ness og Mikkjal Hvannastein at spæla til dans í Badmintonhøllini í Havn.

Harafturat liggur tað fast, at teir fara at spæla á Platform 9. november og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 13. desember. Helst verða aðrar framførslur eisini á skránni.

## Faroese Fashion í Smiðjuni í Lítluvík

Hósdagin 3. oktober, lat Rannvá í Baianstovu upp almenna framsýning við klæðum, sum eru tilvirkað úr føroyskari ull, bæði til menn og kvinnur. Sniðið er klassiskt og elegant við nútímans sniðgeving. Rannvá hevur havt framsýningina í Gallarí Ribarhúsi í Fuglafirði, og var henda framsýning sera væl vitjað.

Framsýningin er opin frá 3. til 8. oktober.

# JM Band spælir í Fuglafirði

**Jens Marni Hansen og hansara menn fara at spæla til fótbóltsdans í Fuglafirði leygarkvøldið**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



Um vikuskiftið endar landskappingin í fótbólti, og hetta plagar at verða hildið við tiltøkum kring landið. Í Havn verður ivaleyst óførur rómur, tá HB skal feira sín meistaraskap, men aðrastaðni hava spælarar, viðhaldsfólk og onnur helst eisini hug at hugna sær leygarkvøldið.

Í Eysturoynni plagar fótbóltsdansur at verða hildin, og hesaferð er hann í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Har fer Jens Marni Band at spæla. Oddamaður í hesum bólki er Jens Marni Hansen, sum fólk seinastu vikurnar hava sæð í donsku sendirøðini Popstars. Afturat sær hevur hann Ólav Øster, Rógva á Rógvi og Paula Magnussen.

Jens Marni hevur ikki spælt so nógv seinastu vikurnar, men nú ber til at síggja hann á palli aftur.

# Arkitekturur og design í Norðurlandahúsinum



Leygardagin letur upp framsýning í móttøkuni í Norðurlandahúsinum av byggi- og brúkslist. Tað eru arkitektarnir Mayfinn Norðoy og Robert Thomassen, sum saman við designaranum Jógvan Biskupstøð, ið sýna fram.

Hesir tríggir vísa fram sínar endaligu verkætlanir frá ávíkavist Kunstakademiets Arkitektskúla í Keypmannahavn og Danmark Designskole í Keypmannahavn.

Mayfinn hevur arbeitt við Tjóðarsavni á Boðanesi, meðan Robert hevur arbeitt við býarbygging í Tórshavn og Jógvan hevur samstundis arbeitt við einum modernaðum knívi í einum traditionellum samfelagi.

Framsýningin er opin frá leygardegnum 5. oktober til fríggjadagin 11. oktober.




Konfirmatións-
klæðir til
hansara
fáast í



Kallkyn Vágsbotnur Tel. 31 62 06

http://www.sosialurin.fo
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Shuttle SS51G
- Nýggja teldan við slóðbrótandi sniði



Slag ...........: Aluminum kabinet, Extra silence
Stødd .........: 300(d) x 200(b) x 185mm(h)
Front panel.: 2 USB 2.0 port, 1 Firewire IEEE 1394, 1 SPDIF Out, 1 MIC-In, 1 Speaker Out, Power-On, Reset
Back panel.: 2 seriel port, 2 Firewire 1394 port, 1 SPDIF In, 2 USB 2.0 port, 1 RJ45 port
Processor ..: Intel Pentium 4 2000MHz
RAM...........: 256MB DDR
Harðdisk ....: 40GB 7200rpm
Skerm .........: 15" TFT litskerm v. innbygdum háttalarum
Drev ...........: CD-ROM drev 52x
Diskladrev 3.5" 1.44MB
Netkort ........: 10/100Mbit
Forrit ..........: Windows XP Professional

Komið og síggji hana í handlinum!
kr. 15.450,- v/MVG

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 > Postsmoga 1144 > FO-110 Tórshavn
Tlf.: 317620 > Fax: 317699 > www.tt.fo

Lýsið við brúktum bilum



Diva · Diva · Diva · Diva · Diva · Diva · Diva
Diva
Nýggjur mótahandil letur upp
leygardagin 5. oktober
opið er til kl. 17.00
team 85 • 358000
Livandi tónleikur frá kl. 1400–1500 við Lailu Carlsen og Jóannes Ólavsson
Diva
Dr. Jacobsens gøta 3, Tel 322680

HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

Vegna tekniskar trupulleikar letur matstovan ikki upp fríggjadagin



Lýst verður seinni nær matstovan letur upp
Fuglafjarðar Mentanarhús

Frá Sjúkrasystrafelag Føroya
Sjúkrasystrar og lesandi
Eykaaðalfundur
Eykaaðalfundur um navnabroyting verður á Hotel Føroyum leygardagin 12.oktober 2002 kl. 14.00.
Sjúkrasystrafelag Føroya

Reingerðarfólk
Søkt verður eftir fólki til at gera reint í Skúlanum í Hoyvík og Hoyvíkshøllini at byrja sum skjótast.
Nærri fæst at vita við at ringja til skúlan tlf. 315073.
Skúlin í Hoyvík